# Hundrað herðaklapp til Hoydalar

KÁRI MORTENSEN



Jante er ein býur í Føroyum: "Du skal ikke tro du er noget, og hvis du tror du er noget, så er det noget du har misforstået".

Hava túsundtals næmingar, lærarar og starvsfólk, sum hava havt sína dagligu gongd í Hoydølum øll misskilt:

At skúlatænarar og vaskikonur, hóast vánaligar umstøður, hvønn dag gera skúlan til eitt sera gott arbeiðspláss fyri 700 fólk?

At kantinan er nýggj og vælvirkandi og nøktar júst tann tørvin, sum biðið verður um?

At frálæran í føroyskum, donskum, enskum, týskum, fronskum, russiskum og sponskum er framúrskarandi?

At undirvísingin í geografi, søgu, vinnulívsbúskapi, fiskivinnu og samfelagsfrøði er í topp?

At undirvísingin í fornaldarfrøði, religión, filosofi og psykologi brýtur mørk?

At ítróttarundirvísingin og undirvísingin í tónleiki, filmslist, leiklist og evning er tann mest fjølbroytta í landinum?

At undirvísingin í biologi, fysikk, stjørnufrøði, teldufrøði, kemi og matematikk ikki fæst betri í landinum?

At bókasavnið og teldumhvørvið (hóast undirmannað) eru millum tey bestu í landinum?

At studentaskúla- og HF-skipanin er eitt sera gott concept?

At Hoydalar er eitt super brand, sum skapar og lyftir ?

Vís mær tín gerandisdag, og eg skal siga tær, hvør tú ert

Far og vitja í Hoydølum ein vanligan gerandisdag og gev tær stundir at síggja alla skógina og ikki bara tey brotnu trøini.

So sært tú koncentreraðar lærarar, sum berjast fyri at geva tað besta tey eiga. Tú sært málrættaðar næmingar, sum vita, at tað er nú, tað telur.

Tú sært ein skúla í gear, sum trekkir, hálar og skumpar – sum hann hevur gjørt tað í Hoydølum í 50 ár, og sum hann fer at gera tað í 50 ár aftrat.

**Ikki tvídráttur, men samanhald**

Eyðkenni fyri Hoydalar er samanhald um eina sterka stevnu. Eitt concept og eitt brand, sum er so sterkt, at tað sum onki hevur yvirlivað fordómsfullar ágangir, alt ov smáar játtanir og manglandi útbyggingar.

Tað er far far out at geva lærarum skyldina fyri manglandi játtan gjøgnum nógv ár.

Kann ein grund til manglandi játtan vera, at skúlin er landsstovnur heldur enn kommunalur, sum til dømis Vestmanna Skúli? Hann er 10 ár eldri enn skúlin í Hoydølum og hóast tað umbygdur og nýbygdur, so hann í dag er fyrimynd fyri føroyskt skúlaumhvørvi.

**Tora tit?**

Tit, sum ráða fyri borgum, tora tit at ignorera henda veruleika?

Hví tora tit ikki at lurta eftir arbeiðsfólkunum á hesum væla arbeiðsplássi?

Tað er eitt vágaverk og kanska ein illusión av teimum heilt stóru at flyta alt virksemi í ein depil og í eina heilt nýggja skúlaskipan.

**Hoydalar hypermodernaður skúli og mentanardepil**

Byggið nýtt tónleika- og evningshús.

Byggið nýggjan millumbygning við nýggjum skúlastovum og nýggjari samkomuhøll.

Byggið nýggja ítróttarhøll.

Høvuðsumvælið gomlu bygningarnar (ella byggið nýggjar), so teir lúka øll nútíðar krøv.

Og gevið Hoydølum hundrað herðaklapp fyri enn sum áður at ganga á odda at lyfta inn í framtíðina.

Hava tit skilt boðskapin?

Ella skal eg stava hann fyri tykkum?

H O Y D A L A R

# Brenniovnar drepa

ERLING EIDESGAARD



Vetrarhálvuna er ein støðugur deymur av royki frá brenniovnum í mongum grannaløgum og mongum stovum. Hesin roykur hevur sera álvarsligar avleiðingar á heilsuna hjá fólki. Millum avleiðingarnar kunnu t. d. nevnast astma, kyknubroytingar, børn við degenereraðum lungum, millumoyrnabruni, roykjaralungu, hjartasjúkur, krabbamein, viknað immunverja og defektir á nervaskipan. Børn verða harðast rakt.

Ein vanligur brenniovnur dálkar uml. 800 ferðir meira enn eitt oljufýr. Ein hypermodernaður brenniovnur dálkar uml. 400 ferðir meira enn eitt oljufýr. Og hetta er, tá ið brendur verður turrur, reinur viður. Tað er ræðandi at hugsa um, hvat fólk heima í teirra stovum og kjallarum harumframt tveita inn í ovnarnar.

Partiklarnir, ið eru í royki frá brendum viði eru sera smáir. 90% eru minni enn 1 micron og harvið minni enn miðalbakteriur. Teir eru so smáir, at meir enn helvtin av mongdini uttandura treingir ígjøgnum húsaveggir, uttan mun til hvussu húsini eru bygd og bjálvað. At vindeygu og hurðar eru afturlatin ger lítlan mun.

Føroyar liggja mitt úti í Atlantshavinum, langt frá stórum ídnaðarøkjum við fríska ri luft, so langt sum eygað ber og harvið øllum fortreytum fyri heimsins bestu luft. Hetta er eitt av okkara størstu aktivum. Tí er harmiligt, at vit lata nøkur fá fólk dálka luftina hjá teim mongu.

Hendan dálking er óneyðug og kann tí ikki góðtakast. Brenniovnar eru uttan iva hugnaligir og kunnu harumframt vera ein fíggjarlig sparing. Men hugni og sparing eru ikki haldgóð argument fyri at seta heilsuna hjá øðrum í vanda. Fólkaheilsa kann ikki gerast upp í pengum.

Timburhandlarnir gera nógv burturúr at selja brenniovnar, nú oljan dýrkar, so talið av brenniovnum er ivaleyst alsamt vaksandi. Umhvørvisliga og fólkaheilsuliga er hetta eitt risa afturstig.

Sum ikki einaferð, so er Kalifornia undangonguland. Har síggja vit nú alsamt fleiri bann ímóti brenniovnum, peisum o. tíl. - heilt einfalt tí tað óneyðugt lækkar lívskvalitet og setur mannalív í vanda. Eisini í grannalondunum eru fólk so smátt farin at ressast. Fyrr ella seinni kemur rákið ivaleyst eisini hendan vegin.

Kanska er hetta okkara gylti møguleiki fyri at gerast undangonguland. Lat okkum virða rættin hjá tí einstaka at fylla lunguni við fríska ri luft og sum heimsins fyrsta land seta forboð ímóti brenniovnum. So ganga vit nøkur fet niðan grønu brekkuna.

Relative Sizes of Particles and Comparison of Dimensional Units

*1 micron is a millionth of a meter or 1 inch divided into 25,400 parts.*

| Substance | Micro-meters (microns) | Inch |
|---|---|---|
| 90% of Wood smoke particles are smaller than | 1 micron | 0.00004 |
| Bacteria (average) | 2 | 0.00008 |
| Red Blood Cell | 8 | 0.0003 |
| Talcum Powder | 10 | 0.0004 |
| White Blood Cell | 25 | 0.001 |
| Human Hair | 70 | 0.003 |
| Grain of Table Salt | 100 | 0.004 |

***Keldur:***


• Burning Issues (US): http://burningissues.org
• Armidale Air Quality (AU): www.3sc.net/airqual
• UK National Air Quality (UK): www.airquality.co.uk
• UK Health (UK): www.advisorybodies.doh.gov.uk/comeap
• Environment (EU): http://europa.eu.int/comm/environment/air/index.htm
• WHO Regional Office for Europe (EU): www.euro.who.int/air
• Astma og Allergiforbundet (DK): www.astma-allergi.dk


# Byggið verðsins størstu vindmyllu á Sumbiarstein og gloymið íslandskaðalin fyribils

Val



BJARTI THOMSEN
sivilverkfrøðingur
Sambandsflokkurin

Í nakrar vikur hevur loysunarorðið í føroyskum orkupolitikki verið ein elkaðal til Íslands. Ført hevur verið fram, at hetta loysir upp fyri føroyskum fiskiskipum viðvíkjandi Kyotokravinum * hvør skal siga, so kunnu tey halda fram við at dálka. Eisini sigur Vinnuvitan í stórari yvirskrift frá ráðgevingini hjá landsstýrinum, at íslandskaðalin økir um møguleikarnar við vind- og alduorku, tí undirstøðukervið verður styrkt. Undarligt at blaðmaðurin á Vinnuvitan ikki setur spurnartekin við hesa øvugtu grundgeving.

Tíbetur er onkur, sum enn hevur beinini á jørðini. Í sjónvarpssending herfyri staðfesti umboðið hjá SEV, at um vit skulu fáa el-megi úr Íslandi, so mugu vit fyrst hava 100% backup í Føroyum. Hetta er satt sum tað er sagt, tí fer ein trolari avstað við kaðalinum ella kemur kinkur á av øðrum orsøkum, so sita allir føroyingar við køldum afturparti í bølamyrkri. Eisini sjónvarpsverturin í samrøðu við nýggja SEV-stjórðan hevði fatur í rætta endanum, tá hann setti spurnartekin við, um tað er rætt, at avbrótarin er í einum øðrum landi.

Íløgan í ein íslandskaðal, tann longsta av sínum slag í heiminum, er mett at kostað útvið 2 milliardir krónur. Her skal havast í huga, at hetta er bara fluttningurin - vit eiga framvegis ikki framleiðslutólini og mugu keypa ta orku, sum skal flytast gjøgnum kaðalin. Fyri sama pening kundu vit bygt nakrar stórar vindmyllur, sum nøktaðu allan okkara tørv til upphiting og el-nýtslu. Heldur enn at kannað møguleikar fyri einum kaðali, áttu vit at kanna hvussu verðsins størsta vindmylla á Sumbiarsteini kann knýtast í SEV-netið í Vestmanna ella á Eiði, so at vindorka kann arbeiða saman við vatnorku. Pf Røkt í Vestmanna hevur eisini víst á, hvussu vindur og vatn kann samarbeiðast til eina støðuga orkukeldu.

Orsakað av vindviðurskiftum gevur ein vindmylla í Føroyum dupulta orkuframleiðslu um veturin í mun til um summari. Hetta samsvarar perfekt við orkutørv til upphiting av sethúsum. Vindviðurskiftini í Føroyum gera, at ein vindmylla her framleiðir næstan dupult so nógva orku, sum ein líknandi vindmylla í t.d. Danmark.

Tí eiga fyrireikingar til ein el-kaðal úr Íslandi til Føroya at steðga, til stungið er út í kortið, hvussu vind- og vatnorka verða útbygd og samankoyrd her á landi, so at allur tørvur til bæði upphiting og elnýtslu verður nøktaður við hesum báðum varandi orkukeldum.

Lesið Sosialin -so eru tit við!